# Eivør er í uppskotið til seks danskar heiðurslønir

**Eivør Pálsdóttir gjørdist í gjárkvøldið eitt stórt navn í donskum fólkatónleiki, tá hon varð skotin upp til helvtina av heiðurslønunum til Danish Music Awards Folk**

VIRÐISLØN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*– Eg skilji als ikki, hví tú skrivaði »tillukku« í sms'in til mín, segði Eivør Pálsdóttir ovfarin, tá Sosialurin ringdi til hana eftir konsertina í Wien í gjárkvøldið*

Tá nøvnini á teimum, ið eru í uppskotið til donsku fólkatónleikaheiðurslønirnar á Danish Music Awards Folk, vórðu almanankunngjørd, var navnið hjá Eivør Pálsdóttir nevnt sum uppskot til seks av teimum tólv heiðurslønunum. Hon er í uppskoti fyri m. a. bestu fløgu, sum besti sangskrivari, besti komponistur og besta sangrødd.

Til fimm av heiðurslønunum er Eivør í uppskoti saman við trimum øðrum, meðan í uppskotinum um bestu fløgu kappast seks fløgur. Tað var herfyri greitt, at Eivør var eitt av nøvnunum, ið skuldi spæla á Danish Music Awards Folk. Men nú er møguleiki fyri, at hon kann gerast tann heilt stóra stjørnan hetta kvøldið. Í øllum førum er hon tann, ið er í uppskoti til flestar heiðurslønir hetta kvødlið.

Eivør er júst flutt til Danmarkar og fer í næstum at royna seg á danska marknaðinum. Hetta byrjar við eini konsertferð í februar og mars. Eingin ivi er um, at tað, at Eivør er í uppskoti til seks heiðurslønir, er sera gott fyri áhugan í hennara konsertum. Hon er yvir eina nátt vorðin eitt væletablerað navn í donskum fólkatónleiki.

Danish Music Awards Folk verða hildnir 11. mars í Tønderhal 1 í Tønder. Umframt Eivør er almannakunngjørt, at Lars Lilholt og Haugaard & Højrup Bigband spæla. Men onnur nøvn vera eisini á plakatini.

Skipað hevur verið fyri DMA - Folk síðan 2001, og tiltakið plagar altíð at vera væl vitja. Til ber at keypa atgongumerkið í forsølu frá 6. februar, á telefon +4574724610.

# Eivør trúði tí ikki

**Sosialurin hevði truppult við at sannføra Eivør um, at hon veruliga var í uppskoti til seks heiðurslønir í Danish Music Awards Folk**

VIRÐISLØN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tað var ein skelkað Eivør Pálsdóttir, ið vit fingu í hornið, tá vit ringdu til hana í Wien í gjárkvøldið og søgdu henni, at hon var í uppskoti til seks virðislønir á Danish Music Awards Folk.

Fyrstu fimm orðini vóru HA? Síðan spurdi hon, um vit argaðu hana, ella um hetta vóru loynimyndir.

Men vit fingu hana at skilja, at hetta var ramasta álvara.

Hon var alment vorðin eitt stórt navn í donskum fólkatónleiki og var í uppskoti til helvtina av øllum heiðurslønunum á almenna kvøldinum hjá donskum fólkatónleiki. Ja, at hon faktisk var í uppskoti til allar tær heiðurslønirnar, ið hon kundi vera í uppskoti til. Varð hon veruliga skelkað.

– Hvussu kenna tey meg? Hví eri eg í uppskoti? Eg eri akkurát flutt til Danmarkar.

– Eg havi spælt so lítið har. Hetta er syrutt! Hetta er ræðuliga syrutt! Eg skilti slettis ikki, hví tú skrivaði tillukku í sms boðnum til mín. Eg fari slettis ikki at sovna í nátt! Hetta er ræðuliga abstrakt. Eg fái slettis ikki komið við nakrari skilagóðari viðmerking enn.

Tá vit søgdu henni, at tað var fløgan »Eivør«, ið var í uppskoti til virðislønirnar, gjørdist hon enn meira ovfarin. Tí hon helt, at talan hevði verið um fløguna hjá Danmarks Radio Big Band og ikki um hennar egnu fløgu.

Hon var í frammanundan í góðum lag. Tí stutt áðrenn vit ringdu, høvdu hon og Bill Bourne spælt fyri einum útseldum Mozart sali í Wien. Konsertin hevði gingið sera væl, og gott lív var á fólki.

Hetta er aðru ferð, at Eivør vitjar í Wien, fyrstu ferð var við Yggdrasil fyri nøkrum árum síðan. Men sjálv veit hon ikki, hvussu tað ber til, at hon megnar at fylla eina stóra konserthøll við áskoðarum í Wien. Hon heldur, at kanska er talan um forvitni. Tí hon ivast í, at tey kenna hana har. Hvussu er og ikki, so spælir hon aftur í kvøld í Wien _ hesaferð í einum jassklubba, og øll 300 atgongumerkini eru seld í forsølu.

## FAKTA

**Eivør í uppskoti**
Eivør Pállsdóttir og fløgan Eivør, ið 12 Tónar og Danacord hava givið út í Danmark, eru í uppskoti til hesar seks heiðurslønir:

**Ársins danska útgáva**
Eivør Pálsdóttir - Eivør (12 Tónar/Danacord) Haugaard & Høirup - Gæstebud/Feast (Go' Danish Folk Music) Kristian Bugge - Kristian Bugge (DR) Trio Mio - Pigeon Folk Pieces (Go' Danish Folk Music) Vildnis - København by Night (Art People)

**Ársins danska songrødd**
Eivør Pálsdóttir - Eivør (12 Tónar/Danacord) Peter Belli - Sange fra Blomstersengen (Bonnier Music/Transistor) Sussie Nielsen - Day Is Dawning (Go' Danish Folk Music)

**Ársins danski artistur (nútímans)**
Eivør Pálsdóttir - Eivør (12 Tónar/Danacord) Trio Mio - Pigeon Folk Pieces (Go' Danish Folk Music) Vildnis - København by Night (Art People)

**Ársins danska vísufløga**
Eivør Pálsdóttir - Eivør (12 Tónar/Danacord) Erik Grip - Af et ærligt hjerte (Gyps Fulvus) Fin Alfred Larsen - Matrosens Glade Liv (Musisk decenter)

**Ársins danski sangskrivari**
Eivør Pálsdóttir - Eivør (12 Tónar/Danacord) Lars Lilholt - De Lyse Nætters Orkester (RecArt Music) Morten Nørby - København by Night (Art People)

**Ársins danski fólkatónasmiður**
Eivør Pálsdóttir - Eivør(12 Tónar/Danacord) Harald Haugaard - Gæstebud/Feast (Go' Danish Folk Music) Kristine Heebøll - Pigeon Folk Pieces (Go' Danish Folk Music)

Umframt heiðurslønirnar, har Eivør er í uppskoti, verða hesar virðislønir handaðar á Danish Music Awards Folk: Ársins danski artistur (siðbundin), Ársins danska debut, Ársins danska kontri útgáva, ársins besti instrumentalistur, Ársins danska blues útgáva, árins útlendska útgáva

25. januar 2006

Ársins Leiðaradagur 2006




25. januar 2006 savnast vit aftur.
Vit tosa um ***dagin*** í árinum, har føroyskir stjórar og leiðarar koma saman at dagføra sítt ***know how*** innan leiðslu og altjóða rák.
Tema á degnum er innovatiónsleiðsla, og skráin er aktuel - super aktuel. Vit eru glaðar - sera glaðar, tí vit hava verið so hepnar, at hava fingið játtan frá fleiri serstakliga áhugaverdum persónum, at hava upplegg á degnum.

***Jóannes Eidesgaard***
løgmaður - setir ráðstevnuna
***Steen Hildebrandt***
professari, rithøvundur, fakredaktørur á Børsen, ársins undirvísari í 2001, 02, 03 og 05
***Marjun Hanusardóttir***
løgmansstjóri
***Lars Kolind***
professari, góðseigari, íverksetari, skótaleiðari, fyrrverandi stjóri á Oticon og m.a.
***Annika Mittún Jacobsen***
menningarleiðari í Føroya Sparikassa
***Djóni Dalsgarð***
starvast á Starvsfólkadeildini á Føroya Tele



***Ársins Leiðari 2006***
- kom og ver við til at nominera og velja ársins leiðara 2006

**Øsingin 2006**
- Kom og lat teg provokera - ella gleð teg til endiliga at sleppa at siga, at tú ert samd/ur við dagsins provokatør. Kanska krevst ikki læknaváttan, men øsingin kann ávirka blóðtrýsti.

**3 í sofuni**
Frá hugskoti til veruleika. Tað ræður um at tora... tora at sleppa tryggleikanum, tora at halda fast... Óluva Zachariasen, orðstýrari, setir 3 íverksetarum forvitnisligar og viðkomandi spurningar. Kom og fá íblástur og kanska "sparkið"...

**Eirikur á Húsamørk, Ársins Virki 2005**
Kom og hoyr Eirik greiða frá, hvar hugskotið til Faroe Marine Products kom frá, hvussu man heldur fast við hugskotið, og hvussu man fær starvsfólkið við uppá nýhugsan.

Staður: Hotel Føroyar
Dagur: 25. januar 2006
Klokkan: 08.30 - 16.30
Kostnaður: 2.575,- kr.
Íroknað: Fyrilestrar, kjak, bókin "Hildebrandt om ledelse", íblástur og møguleiki at netverka. Morgunmatur, 2 x kaffi, frokostur og farvældrykkur.

**YOU DON'T WANT TO MISS IT!**

Synergi

Tilmelding og meira um tiltøkini á www.synergi.fo
tel 22 RING (22 74 64) · fax 322 355 · synergi@synergi.fo